## Russar stuðla Zakajev

Kekenski varaforsætisráðharrin, sum situr varðhaldsfongslaður í Danmark eftir kravi frá russisku myndugleikunum, fær nú stuðul úr Russlandi.
Stuðulin kemur ikki frá teimum russisku myndugleikunum, men frá mannarættindafelagsskapum, sum mæla danska løgmálaráðnum frá at útflýggja Zakajev. Í einum brævi, sum varð handað donsku sendistovuni í Moskva, stendur, at Akhmed Zakajev verður uttan iva píndur og síðani avrættaður, verður hann sendur til Russlands.
Millum teirra, sum hava skrivað undir brævið, er Sergeij Kovaljov, sum sjálvur er fyrrverandi politiskur fangi. Hann er í dag limur í russiska tjóðartinginum.

## Rentan niður

Amerikanski tjóðbankin lækkaði í gjár rentuna 0,5 prosentstig, so hon nú er 1,25 prosent. So lág hevur amerikanska rentan ikki verið í 41 ár. Tað kom ikki óvart á nakrar, at tjóðbankin lækkaði rentuna, men eingin hevði væntað, at lækkingin fór at verða so stór. Tey flestu roknaðu við, at rentan í USA fór at lækka 0,25 prosentstig.
Í grundgevingini fyri at lækka rentuna so nógv segði tjóðbankastjórin, Alan Greenspan, at lækkingin er neyðug fyri at seta ferð á amerikanska búskapin, sum er meint raktur av hóttanini um kríggj við Irak. Í oktober mistu 5.000 amerikanarar arbeiðið, og í september minkaðu bíleggingarnar frá amerikanska ídnaðinum 2,3 prosent.
Evropeiski tjóðbankin skuldi í gjár taka støðu til, um rentan í Evropa skal lækka, men eygleiðarar væntaðu ikki, at bankin fór at gera sum tann amerikanski, men at hann helst fer at bíða eftir, um amerikanska lækkingin fær ta ætlaðu ávirkanina.

## Mótmæla sending

Russisku myndugleikarnir eru í øðini um eina sjónvarpssending, sum var í almenna kekkiska sjónvarpinum fyri nøkrum døgum síðani.
Sendingin snúði seg um viðurskiftini í Kekenia, og russisku myndugleikarnir siga, at sendingin kann ikki tulkast sum annað enn stuðul til altjóða yvirgang. Russar undrast á, at kekkiska sjónvarpið sendi sendingina so stutt aftan á kekensku gíslatøkuna í Moskva, sum kostaði umleið 170 mannalív.
Russiska uttanríkisráðið sigur, at meðan heimurin roynir at stríðast ímóti altjóða yvirgangi, eru tað tíverri nøkur lond, sum stuðla yvirganginum. Eitt av hesum londum er Kekkia, støð í einum mótmælisskrivi frá uttanríkisráðnum í Moskva.

## Ryder ikki í fongsul

Kenda amerikanska filmsleikkvinnan Winona Ryder varð mikudagin dømd sek í at hava stolið klæðir fyri 44.000 krónur í einum handli í Beverly Hills.
Dómarin staðfesti, at upptøkutólini í handlinum vístu týðiliga, hvør tjóvurin var, og hann gav ákæruvaldinum viðhald í, at Wynona Ryder hevði stolið klæðini. Ákæruvaldið hevði kravt, at filmsleikkvinnan skuldi í fongsul, men hesum tók dómarin ikki undir við.
Sjálv hevur Wynona Ryder greitt frá, at stuldurin var liður í venjingini til ein film, sum hon var bíðin at spæla, og at tað var leikstjórin, sum hevði mælt henni til at gera eina roynd í einum handli í Beverly Hills.

## UTTAN ÚR HEIMI

# Flogvanlukkan í Luxenbourg ein stór gáta

**Týska flogskiparfelagið sigur, at flogvanlukkan í Luxenbourg mikudagin er ein stór gáta. Flogfarið hevði júst verið til umvælingar**



*Alt vísti seg at vera í lagi umborð á Luxair-flogfarinum, beint áðrenn tað datt niður*

FLOGVANLUKKA
*Árni Joensen:*

Alt gekk, sum tað átti, tá Fokker 50-flogfarið nærkaðist floghavnini í Luxenbourg fyrrapartin mikudagin, men fimm kilometrar frá lendingarbreytini datt flogfarið brádliga niður. Umborð vóru 22 fólk, og bara tvey teirra sluppu frá vanlukkuni á lívi. Annað teirra var tann 27 ára gamli flogskiparin. Hitt var eitt av teimum 19 ferðafólkunum.
Í gjár fóru serfrøðingar undir at kanna innihaldið í tí svarta kassanum og ferðskrivaranum í flogfarinum, men í Týsklandi undrast flogskiparafelagið á, at flogfarið datt niður. Talsmaðurin hjá felagnum, Georg Fongern, segði í gjár, at vanlukkan er ein stór gáta. Sambært talsmanninum var alt í lagi umborð á flogfarinum bara nakrar fáar minuttir, áðrenn tað datt niður.
Sýnið var vánaligt í Luxenbourg hendan fyrrapartin, men tað er vanligt á teimum leiðunum hesa tíðina á árinum. Samferðslumálaráðharrin í Luxenbourg, Henri Grethen, segði í gjár, at hóast sýnið var vánaligt, var tað ikki verri enn vanligt. Hann vísti eisini á, at fleiri onnur flogfør lendu á flogvøllinum uttan nakrar trupulleikar.
Vanlukkan mikudagin var tann fyrsta hjá felagnum Luxair, sum varð stovnað fyri 40 árum síðani. Flogfarið, sum datt niður, hevði verið til umvælingar, og ferðin úr Berlin til Luxenbourg mikumorgunin var tann fyrsta aftan á umvælingina.
Tey flestu ferðafólkini umborð á flogfarinum vóru týsk handils- og vinnulívsfólk.

# Irak fær ein møguleika afturat

**Russar eru framvegis ikki heilt nøgdir við orðalagið í amerikanska uppskotinum um Irak. Kofi Annan vil hava eitt samt trygdarráð at taka undir við tí endaliga orðalagnum**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Fyrrakvøldið gjørdu USA og Bretland enn eina roynd at fáa trygdarráðið hjá ST at gera eina nýggja samtykt um Irak, eftir at Frakland og Russland sýttu fyri at góðtaka tað upprunaliga uppskotið.
Hesaferð er orðalagið broytt eitt sindur. Í tí fyrra uppskotinum stóð, at sýtir Irak fyri at gera eftir krøvunum frá ST, skal tað bera í sær, at hernaðartiltøk kunnu setast í verk ímóti landinum. Í tí nýggja uppskotinum stendur, at sýtir Irak fyri at eftirlíka krøvunum ella forðar vápnaeftirlitsmonnunum at gera sítt arbeiði, kann tað hava hernaðarlig tiltøk við sær. Men fyrst skal málið fyri trygdarráðið. Amerikanarar og bretar siga, at broytingin gevur irakum ein eyka møguleika at gera eftir krøvunum hjá ST.
Men russar eru framvegis ikki nøgdir. Russiski ST-sendimaðurin, Sergej Lavrov, segði í gjár, at stjórnin í Moskva kann framvegis ikki góðtaka uppskotið. Hann vildi tó ikki siga, um Russland fer at nýta sín sýtingarrætt, kemur hetta uppskotið til atkvøðugreiðslu.
ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, hevur sagt, at hann vil fegin hava øll tey fimtan londini í trygdarráðnum at atkvøða fyri tí endaliga uppskotinum. Umframt teir føstu limirnar USA, Russland, Kina, Bretland og Frakland eru Meksiko, Kameroun, Singapore, Bulgaria, Noreg, Demokratiska lýðveldið Kongo, Guinea, Írland og Sýrialand limir í trygdarráðnum í løtuni.

# Átta útlendingar doyðu

**Russisku myndugleikarnir kunngjørdu í gjár nøvnini á teimum 128, sum doyðu í gíslatøkuni í Moskva**

GÍSLATØKA
*Árni Joensen:*

Síðani russiskir hermenn lupu á keksnsku gíslaræningarnar í leikhúsinum í Moskva, hevur dúgliga verið gitt, hvussu mong fólk doyðu av gassinum, sum hermenninir sprændu inn í leikhúsið.
Í gjár kunngjørdu russisku myndugleikarnir so, at 128 fólk doyðu. Samstundis vórðu tey 128 nøvnini almannakunngjørd. Av teimum eru 120 russisk nøvn. Teir átta útlendingarnir, sum doyðu, vóru úr USA, Niðurlondum, Eysturríki, Ukraina, Hvítarusslandi og úr Kasakhstan.
Úr Moskva frættist, at umleið 100 av gíslunum liggja framvegis á sjúkrahúsi, og at seks teirra eru í lívsvanda. Fleiri hermenn, sum vóru við í álopinum á leikhúsið, fáa eisini viðgerð.

# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 8. november til hósdagin 14. november

# Skúlagáttin
## - Fólkaræði í skúlanum



Fólkaræðislig virði í skúlanum er heiti á norðurlendskari ráðstevnurøð, sum endaði við framsýning í Helsingfors hin 29. oktober. Tá høvdu fimm ráðstevnur verið Norðurlond í kring. Fyrsta ráðstevnan í Helsingfors legði dent á rættindi og luttøku hjá børnum, onnur ráðstevnan var í Stockholm, har denturin varð lagdur á jævnrættindi og virðisgrundarlag skúlans, lýst við støði í kyni, stætti og etniskum uppruna. Í Oslo var kjarnin virðisgrundarlagið í skúlans dagliga yrki, og í Keypmannahavn vórðu evnini skúlademokrati og mentanarlig integratión. Á fimtu og seinastu ráðstevnuni, sum varð hildin í Reykjavík, varð spurt, hvussu vit fáa ein meiri fólkaræðisligan skúla. Teir fimm fyrilestrarnir, hildnir av fimm granskarum, eru givnir út í bók "Demokrati i skolans vardag" av Värdegrundscentrum á Lærda Háskúlanum í Umeå. Fyrrverandi forseti Íslands Vígdis Finnbogadóttir
hevur knýtt stevnurnar saman. Í sendingini "Skúlagáttin" verður hon gestur og greiðir frá um tiltakið og fortíð hennara sum lærarari. Vígdis er sonevndur good will sendiharri fyri heimsins mongu tungumál og heiðursforseti í COMEST og UNESCO. Umframt Vígdis hoyra vit eisini Paula Nielsen rektara, Gyðju Hjalmarsdóttir lærara og Beintu Haraldsen studentaskúlanæming.
*Birgir Kruse leggur sendingina til rættis.*

ÚF Mánakvøldið kl. 19.00

# Borð um borð 4/7



*Sunnukvøldið skulu vit í fjórðu og síðstu innleiðandi sendingini í spurnarkappingini "Borð um borð" finna síðstu luttakararnar í hálvfinaluni. Lið A manna hesa ferð: Høgni og Ólavur Waag Høgnesen og lið B: Poul Huus og Annfinnur Olsen. Vertur er Leivur Hansen og dómari Marius Rein. Sunnukvøðldið kl. 20.00.*

SvF Sunnukvøldið kl. 20.00

## The bone collector



3 Sunnukvøldið kl. 20.00

## Tilbage til fremtiden 2



3 Mánakvøldið kl. 20.25

## Undan væðingini



SvF Mikukvøldið kl. 20.00

## Gesturin: Kim Simonsen



SvF Hóskvøldið kl. 20.50